**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

# Leiðari til Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin

Eitt starv sum leiðari fyri Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin undir Heimarøktini og Serforsorgini, verður hervið lýst leyst til setan sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Leiðarin hevur ábyrgd mótvegis stjóranum.

Stuðulsfólkaøkið fyri vaksin fevnir um stuðul til 55 heimabúgvandi brúkarar, svarandi til 40 fulltíðarstørv.

Talan er um starvsøki, sum tann setti skal byggja upp saman við leiðsluni í Heimarøktini og Serforsorgini. Leiðarin hevur dagligu fyrisitingarligu-, fíggjarligu- og fakligu heildarleiðsluna av Stuðulsfólkaskipanini og skal saman við leiðsluni í Heimarøktini og Serforsorgini hava ábyrgdina av:

- at røkta ta fyrisitingarligu leiðsluna
- at uppbyggja og samskipa stuðulsvirksemið
- at veita starvsfólkunum fakliga ráðgeving
- at reka mennandi starvsfólkapolitikk
- at seta í starv og siga starvsfólkum úr starvi eftir nærri ásettum reglum
- at tryggja gott samstarv innanhýsis og við aðrar stovnar og skipanir
- at tryggja støðuga fakliga menning
- at menna samstarvið millum ymiskar fakbólkar, myndugleikar og áhugabólkar
- at hava eftirlit við at játtaða fíggjarætlanin verður hildin
- at fyrireika fíggjarlógararbeiðið fyri virksemið hjá skipanini

**Krøv:**
Tað verður væntað av umsøkjaranum, at hann hevur viðkomandi fakliga útbúgving og royndir, hevur hug og hegni at arbeiða sjálvstøðugt og dugir at seta í verk fyriskipanir. Fyrimunur er um umsøkjarin hevur leiðslu- og fyrisitingarligar royndir av líknandi arbeiði.

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina. Tænastustaðurin í løtuni er Stuðulsfólkaskipanin.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur innan stovnin.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Heimarøktina og Serforsorgina á tlf. 304020 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra ella við Regin Johansen, virkandi leiðara fyri Stuðulsfólkaskipanina.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Att.: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarði 2, Postboks 3037
FO-110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 30. september 2003 kl. 12.00.

---

**Vestmanna Arbeiðarafelag**

## Aðalfundur

Lýst verður til eykaaðalfund 20. sept. kl. 14.30.

- Uppskot frá nevndini um at hækka limagjaldið.

**Nevndin**

---

Lesið Sosialin

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3652
**Navn:** Sp/f Indigo
**Adressa:** á Hjalla, 188 Hoyvík.

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 10.09.2003
**Viðtøkudato:** 10.09.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnarar:** Anna Kristina Haldis Hansen, 460 Norðskáli og Sveinur Høgnason, Varðabyrgi 20, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Anna Kristina Haldis Hansen, 460 Norðskáli og Sveinur Høgnason, Varðabyrgi 20, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 10.09.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil, tænastu og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 11. september 2003*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3649
**Navn:** Sp/f SH-Bygg
**Adressa:** 950 Porkeri.

**Kommuna:** Porkeris Kommuna
**Stovningardato:** 09.09.2003
**Viðtøkudato:** 09.09.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur**: Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Herman Signarson Olsen, 850 Hvalba.
**Stjórn:** Herman Signarson Olsen, 850 Hvalba.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Grannskoðaravirkið Højmose, v/ Børge Christiansen, 370 Miðvágur.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár**: 09.09.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka vinnu innan handverk og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 11. september 2003*

*Kristin Balle*

---

# Lærlingur søkist

Lærlingur søkist til Safari Transport, at byrja skjótast gjørligt. Arbeiðið umfatar bæði skrivstovuarbeiði og vørukoyring.

Tú skal vera fyrikomandi og hava hug at arbeiða.

Lærutíðin er 2 til 3 ár, alt eftir hvørja útbúgving, tú hevur áðrenn. Løn sambært avtalu.

Tú verður útbúgvin skrivstovufólk innan Speditión og Shipping.

Safari Transport arbeiðir við flutningi av flog- og sjófrakt, tollavgreiðslu og at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. september.

Hava tit spurningar viðvíkjandi arbeiðinum, vinarliga ring til okkum.

**SAFARI TRANSPORT**

Eystara Bryggja · FO-110 Tórshavn
Tlf. 322222 · Fax 313222
E-mail: safari@safari.fo
web: www.safari.fo

---

*klipp og goym*

# Fyrstafloks seyðahegn

**50m X 90cm**
**6 tráðað**
**Yvir og undirtráður 3mm**
**Millumtráður 2,5mm**
**Meskavídd**
**B. 15cm H. 14cm til H. 22cm**
**Galvanisering 240g/m2**

**Einans kr. 375,-**

**Fa. H.J. Michelsen. Handan Á 6**
**tlf. 31 44 14 - 21 44 14**

Sosialurin 341800

---

# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

**Nú eisini úr Føroyskum gróti**

Skjót levering

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Danstein** Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK · R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820

---

FÓLKADANSUR

# Fólkadansur í bygdarhúsinum í Hósvík

Byrjað verður sunnukvøldið 28. sept. kl. 19.00 – 21.00

Kostnaður fyri veturin **kr. 400,00 pr. par**



Lærarar eru Matilda og Tom Nielsen

Tilmelding á telefon:
Ann 422368/264820
Elin 422291/265844
Ida 422425/213425

**Dansifelagið Fragdin**

Øll eru vælkomin!

---

Mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens og Barnabókaheiðurslønir Tórshavnar Býráðs.

Mikudagin 17. september 2003, klokkan 17 handar Tórshavnar kommuna Mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs í **Sjónleikarhúsinum**

Øll hava atgongd

**Tórshavnar kommuna**

Sosialurin 341800

---

# EYDNUHJÓL

Eydnuhjól verður við Gjógv sunnudagin 21. september 2003 til frama fyri bygdarhúsið.

Tey, ið ynskja at stuðla tiltakinum, kunnu venda sær til ein av nevndarlimunum:

Olaf Fríðheim, tlf. 423346
Kristian Jákup Joensen, tlf. 423325
Sofus Johannesen, tlf. 423398

*Gjáar Samkomuhús*

---

# Hondbóltsfelagið Tjaldur

| kl. | Mánadagur | Týsdagur | Mikudagur | Hósdagur |
|---|---|---|---|---|
| 15.00-16.00 | Gentur 10 (93/93) | Dreingir 10 (93/94) | Gentur 10 (93/94) | Dreingir 10 (93/94) |
| 16.00-17.00 | Gentur 12 (91/92) | Dreingir 12 (91/92) | Gentur 12 (91/92) | Dreingir 12 (91/92) |
| 17.00-18.00 | Gentur 14 (89/90) | Dreingir 14 (89/90) | Gentur 14 (89/90) | Dreingir 14 (89/90) |
| 18.00-19.30 | | | | Dr. 16 + Ungl. |
| 19.30-21.00 | | | | Kvinnur |
| 19.00-20.00 | Ge. 16 + kvu | | kvinnur á Kambsl. | |
| 20.00-21.00 | Dr. 16 + Ungl. | | | |
| | | | | |
| 19.00-20.30 | | | Ge. 16 + kvu. | |
| 20.30-22.00 | | | Menn | |

Venjingin byrjar mánadagin 15. september 2003

Sosialurin 341800

---

**BILSKROKK**
*Lakkering & Plátuverkstaður*



TLF. 32 24 71
Royn heimasíðu okkara á www.bilskrokk.fo

---

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

---

i Sosialurin

---

LÝSINGAR
PLAKATIR
T-SHIRTS
SKILTIR
FLØGG...
- vit gera alt grafiskt arbeiði
GRAFIX
TRONGISVÁGUR
22 42 51

---

# Varaleiðari í Fótbóltssambandi Føroya

Starvið sum varaleiðari í Fótbóltssambandinum verður við hesum lýst leyst til setan 15. oktober 2003 ella eftir nærri avtalu.

**Møgulig málsøki:**
- Minstukrøvini frá UEFA til feløgini
- Lógir og reglur hjá FSF, FIFA, UEFA og ÍSF
- Landsliðsmál

**Vit hugsa okkum, at tú hevur:**
- kunnleika til føroyskan fótbólt
- kunnleika til fyrisiting
- hollan kunnleika til enskt og føroyskt
- góðan kunnleika til brúk av teldu
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt fjølbroytt og avbjóðandi sjálvstøðugt starv, krevjandi og til tíðir strævið, men áhugavert og mennandi. Løn eftir avtalu.

**Umsóknir:**
Umsókn við møguligum upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til:

**Fótbóltssamband Føroya**
**Postrúm 3028, 110 Tórshavn**

Umsóknirnar skulu vera Fótbóltssambandinum í hendi seinast 1. oktober 2003

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Ísak Mikladal, aðalskrivara, tel 21 19 88

Sosialurin 341800